# Tá børn eru avvarðandi

(Udsat, nr. 14, 5. árgangur, nov. 2008) – Mogens N. Christensen

Marra, angist, avbyrging. Tað kann hava bæði stutt-tíðar og lang-tíðar ávirkan at vera avvarðandi í barnaskóm. Tað vísa úrslitini av kanningum, har børn, sum vaksa upp í familjum við misnýtslu-trupulleikum eru kannað. Men granskingin er ikki eintýdd, tí summi trívast væl sum vaksin hóast vána líkindi í barndóminum.

Kunnu vit spáa um lívið hjá einum barni, um vit kenna korini tey eru uppvaksin undir? Tílíkir spurningar hava samfelagsgranskarar á ymiskan hátt sett sær. Hvat hendir, um eitt barn er uppvaksið í eini familju, sum er merkt av harðskapi og drykkjuskapi? Ella av kriminaliteti og rúsevnum? Ella hvat um mamma og babba eru sálarliga sjúk ella arbeiðsleys í longri tíð?
Stutta svarið er, at vit ongantíð kunnu spáa um lívið hjá tí einkulta. Torført kann vera at skilja ymisku faktorarnar sundur, men gransking í dag gevur okkum nøkur áhugaverd úrslit, sum vit kunnu gera brúk av, tá vit skipa okkara samfelag. Eitt øki, vit hava rættiliga stóra vitan um, er børn, sum vaksa upp í familjum við misnýtslu-trupulleikum.

## Foreldrini

Ein donsk kanning hevur víst, at hjá uml. 4% av børnunum í einum árgangi hava annað ella bæði foreldur eitt alkohol-misbrúk. Tá eru bara tær tyngri lastaðu familjurnar taldar við, har annað ella bæði av foreldrunum eru innløgd í samband við misbrúkið.
Tað kann vera torført at skilja misbrúks-trupulleikar frá viðgerðarkrevjandi sálarligum trupulleikum, sum eru tengd saman. Orsøkin er helst bæði ein fylgja av, at misbrúk yvir longri tíð gevur sálarliga líðing, og at sjúklingar við sálarligum líðingum royna at dempa óttan við rúsdrekka. Hetta kann geva lívrunnan heilsaskaða og minnisloysi, misfatan av misbrúkinum, avnoktan og eisini aðrar líðing so sum trupult at sova, vaml, ristingar og angist-herðindi. Sosialar fylgjur kunnu vera persónligheits-órógv, afturtøku og sosiala avbyrging (isolatión).
Samanumtikið eru trupulleikarnir og líðingarnar so umfatandi, at tað ikki bara ávirkar høvuðspersónin, men eisini tey avvarðandi – serliga børnini. Men hvussu?

## Avleiðingar fyri barnið

Sosialpsykologisk gransking hevur víst á, at barnið upplivir svík ferð eftir ferð, av teimum vaksnu, sum tað er bundin at. Foreldranna persónligheit-broytingar við atburði sum er ófyrisíggjandi og ikki reglubundi (ókensekvent), verður lýst sum ræðandi royndir, barnið kann fáa. Tí barnið er loyalt yvirfyri foreldrunum, og eisini skammar seg, kann gera, at barnið ikki fær snakka við nakran um trupulleikarnar. Nakrar kanningar vísa á, at alt ov stór ábyrgd verður løgd á barnið, tá foreldrini vegna misbrúkið ikki kunnu taka sær av grunnleggjandi viðurskiftum, sum t.d. innkeyp, matgerð, taka sær av yngri systkjum. Interview-kanningar vísa, at børnini verður drigin inn í at goyma misbrúkið, og at foreldrini ikki vita hvussu tyngjandi børnini uppliva hetta. Serliga yngri børn kunnu taka ábyrgd fyri drekkaríið hjá foreldrunum og tað kann enntá føra til umvendar umsorganar-leiklutir.

Aðrar kanningar vísa eisini, at harðskapur kemur oftari fyri, har misbrúk er. Ofta mangla foreldrini evnini at meta um alvorin av tí harðskapi og pínu, tey valda børnunum. Kropslig skamfaring (mishandling), kynsligur ágangur og óhapp koma nógv oftari fyri, har misbrúk er. Eisini vísir ein donsk kanning, at sálarlig skamfaring (mishandling) og vanrøkt koma serliga ofta fyri, har misbrúk er.

## Atburður/reaktión og avleiðingar

Barnið kann uppliva svøvntrupulleikar, marru, depressión og angist og afturat tí eisini hugsavningar/konsentratións- og innlæringstrupulleikar í skúla. Harafturat er eisini tann manglandi veruleikafatanin, sum ofta fylgir misbrúkinum, sum er serliga tyngjandi fyri barnið. Børn eru bundin at kensluligu støðuni hjá foreldrum sínum. Sjálvt smá børn verða noydd at læra seg at skilja ymiskt til tess síggja frammanundan og at skilja kenslurnar hjá foreldrunum – bæði tær sjónligu og goymdu. Tískil gerast børnini serfrøðingar at týða kensluliga umhvørvi heima.
Hvussu álvarsamar hesar fylgjur gerast, er bundið at ymiskum, serliga álvarsemi í misbrúkinum og hvussu leingi tað varar. Tyngdarfaktorar (belastningsfaktorer), sum teir nevndir her, kunnu generelt hugsast at bera við sær nógvar ymiskar avleiðingar hjá børnunum sum viðgerðarkrevjandi sálarligar líðingar, kriminalitet og sjálvoyðandi atburð/atferð.
Tískil er orsøk til at geva teimum børnum gætur, sum vaksa upp við foreldrum, sum hava eitt rúsdrekkamisbrúk.

## Trøvsøgnin/paradoksið

Kanningarnar, sum her eru nevndar, leiða til nýggjar spurningar og nýggjar granskingarverkætlanir, tí ein tvørsøgn er komin undan kavi: Øðrumegin vísir granskingin ein mangul av foreldra-evni/førleika vegna misbrúk og sálarliga sjúku, sum kann bera við sær oyðilegging av barnins sjálvsvirði og tess møguleikar at virka sosialt, kensluliga og innlæringsliga (indlæringsmæssigt).
Hinumegin vísur onnur kanning (Werner og Smith), gjørd av børnum, sum eru voksin upp í stór-vanda (høj-risiko) umstøðum á oynni Kauai (Hawaii). Ein triðingur av børnunum høvdu livað við stórari tyngd so sum fátækradømi, alkoholismu, ósemjum og sálarligum líðingum. Men fleiri av hesum kláraðu seg yvirraskandi væl sum vaksin.
Fleiri kanningar verða gjørdar fyri at staðfesta hví børn, hóast vána líkindi, gerast sjálvstøðug og vælvirkand vaksin. Vit kunnu hugsa okkum til fleiri frágreiðingar. Sosialt stuðlandi relatiónir til onnur vaksin, intelligens, viðfødd lyndiseyðkenni, sum t.d. eitt ávíst harðføri, góð skúlagongd og seinni útbúgving kunnu vera slíkir veju-faktorar. Sosial uppílegging, sum t.d. fyribyrgjandi ella loftandi fyriskipan frá myndugleikunum, kunnu vera aðrir faktorar. Men í hvønn mun hesir faktorar ávirka, um tað eru aðrir, og um man kann avgera hvønn vigar mest, vóna vit at fáa meira vitan um.

*Umsett úr donskum: Margreth Olsen*